Lær at lesa Bíbliuna

Omanfyrinevnda yvirskrift kann fyri nøkur tykjast onkursvegna trúttandi. Mong eru tey, sum halda at tey sjálvi skulu finna útav, hvussu bíblian ella a›rar skriftir skulu lesast, men hetta er eisini júst endamáli› vi› skei›num, sum eini 70 ungdómar luttóku á um páskirnar.

Skei›i›, sum fór fram á Zarepta, er vi› tí›ini vor›i› eitt afturvendandi tiltak, og undirtøkan fyri hesum hevur eisini veri› alsamt vaksandi. Sum nevnt, so var endamáli› ikki at trútta ni›ur í fólk, hvussu tey skulu lesa bíbliuna. Tvørturímóti var› lati› upp í hondunum á luttakarunum, sjálvi at lesa og hugsa um tekstirnar. Eisini eftir at skei›i› er loki›.

Á mi›sí›unum er meira at lesa um hesar fimm dagarnar, sum ungfólkini vóru á Zarepta.

Rás 2 er sum kunnugt farin at senda úr Klaksvík, og hetta hevur eisini vi›ført, at fleiri n‡ggjar sendingar og fleiri n‡ggir vertir eru at hoyra í luftini.

Yngd hevur hitt tveir (ella skuldi ta› kanska veri› tvey) av hesum n‡ggju vertunum. Talan er um Ragnhild Ellingsgaard og Allan Poulsen, sum í felag standa fyri n‡ggju ungdómssendingini, Potturin, sum framyvir ver›ur at hoyra hvønn sunnudag.

Roskilde Festival nummar 30 fer av samlibandinum seinast í juni mána›i. Yngd hevur hugt eitt sindur at, hvussu fyrireikararnir hava lagt alt til rættis hesu fer›. Sum vera man, so ver›a fleiri sera kend nøvn á pallinum, teir f‡ra dagarnar tiltaki› varir, og millum anna› ver›a Pet Shop Boys, Iron Maiden, Oasis og Travis at hoyra.

Harumframt er sjálvandi eisini ein ørgrynna av minni kendum bólkum vi› á festivalinum, har 70.000 fólk fáa atgongd. Hevur tú hug at vera millum hesi, hevur Yngd eisini svar uppá, hvussu hetta kann lata seg gera

Eftir er bert hjá okkum at ynskja tykkum gó›an mikudag, og er hetta vi› hesum gjørt

Yngd

Send inn og vinn

3 arin

letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.



Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd“. Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3‘aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Yngd SOSIALURIN

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd í Sosialinum hvønn mikudag!

Potturin er komin upp á kók



Sunnukvøldi› var n‡ggja ungdómssendingin Potturin á Rás 2 send fyri fyrstu fer›

Ta› eru tey bæ›i Ragnhild Ellingsgaard og Allan Poulsen sum hava fingi› til uppgávu at fáa pottin uppá kók, og at koyra í tey ney›ugu kriddaríini. Hvørki Ragnhild ella Allan hava fyrr roynt seg vi› útvarpsarbei›i, men hetta for›a›i teimum ikki í at taka av tilbo›num um at royna seg sum útvarpsvertir.

Sunnudagin á›renn Potturin fór í luftina fyrstu fer›, leg›i Yngd lei›ina framvi› studio Pegasus í Klaksvík, har sendingin ver›ur framleidd og send, fyri at lodda d‡pi›. Fyrireikingarnar vóru uppá ta› hægsta, og stemningurin í húsinum var av tí sama eisini nokkso hektiskur, men ta› eydna›ist okkum at fáa drigi› ungu vertirnar til sí›is til eitt stutt prát.

Potturin ein suppa

- Vit hava valt navni› Potturin, tí at ta› navni› loyvir, at man ger eina brei›a sending vi› fjølbroyttum tilfari, har pláss nærum er fyri øllum. Tú kanst koyra alt ni›ur í ein pott og so kóka ta› saman, á›renn tú oysir ta› uppúr aftur, svarar Ragnhild, tá vit fregnast um hví navni› júst bleiv potturin.

- Tú kanst gott fyristilla tær eina orduliga suppu, ha? leggur Allan skemtandi afturat. Ragnhild og Allan vænta ikki at flyta fjøll vi› sendingini. — Fyrst og fremst vilja vit gera eina ungdómssending, sum vit sjálvi halda, at vit høvdu tíma› at lurta eftir. Ein sending til ung, gjørd av ungum.

Tey siga ví›ari at ætlanin er í sendingini er at taka upp ymisk evni, sum fordómar eru kn‡ttir at, og vóna vi› hesum, at tey kunnu fáa fólk at skilja hvønn annan betur. Hetta ljó›ar ikki av so lítlum. — Okay vit hava ikki allar ver›ins royndir vi› útvarpsarbei›i, men vit vænta at vaksa vi› uppgávuni leggur Allan afturat.

Ganga í skúla saman

Ta› var mestsum av tilvild at ta› blivu júst Ragnhild og Allan sum fingu til uppgávu at røra í pottinum. — Steintór Rasmussen, sum er lærari hjá mær á Tekniska Skúla, lufta›i tankan um at fáa meg vi› í eina sending, tá ætlanirnar um at senda úr Pegasus vóru byrja›ar at búnast, sigur Ragnhild. —Eg fekk til uppgávu at hava antennurnar úti, og royna at finna onkran annan sum vit kundu hava vi›, sigur Ragnhild ví›ari. Vali› fall á Allan sum eisini er næmingur á tekniska skúla. — Eg helt at hetta ljó›a›i sum ein spennandi uppgáva, og skal eg vera erligur, so má eg vi›ganga at eg eisini onkuntí› hava gingi› vi› tankanum um at sleppa at royna meg vi› eini útvarpssending.

Sum sagt so hava hvørki Ragnhild ella Allan fyrr roynt seg fyri opnari mikrofon, og sum sunnudagurin er farin at lí›a, eru eisini nervanir hjá teimum bá›um, sum skulu í luftina fyri fyrstu fer› farnir at gera um seg. — Jú eg havi eitt líti› sindur av nervum, men ta› ver›ur ikki ordiliga ringt fyrr enn beint á›renn vit skulu í luftina sigur Allan. — Eg havi spælt sjónleik fyrr og rokni vi›, at hetta ver›ur uppá nøkulunda sama máta. Tá komu nervanir ikki fyrr enn beint á›renn eg skuldi á pallin.

Áhugi og forvitni

- Eg haldi at eg hev›i meiri nervar í gjár sigur Ragnhild, sum tó er sannførd um, at teir nokk skulu fara at gera um seg, so hvørt sum sendingin nærkast. Tey eru bæ›i samd um at ta› hev›i veri› eitt sindur ómakaleysari at kunna gjørt eina banda›a sending. —Tá tú ert í luftini beinlei›is fangar bor›i› og eingin vegur er aftur. —Tí er ta› deiliga tryggjandi at vita, at man hevur okkurt banda› innslag í bakhondini, leggur Allan afturat

Hvørki Ragnhild ella Allan vænta at blíva rík av at gera útvarp til ung. Hetta er fyrst og fremst av áhuga og forvitni siga tey bæ›i. Ragnhild sigur seg ganga vi› einum dreymi um at fara journalist vegin, tá hon er li›ug vi› sína skúlagongd á tekniska skúla, har hon í hesum døgum leggur seinastu hond á ta› tr‡ ára longu HT útbúgvingina. Allan hevur ongar konkretar ætlanir um, hvat hann skal fara at takast vi›, tá hann er li›ugur á tekniska skúla — Ta› man tí›in fara at vísa.

Eftir at tøkningurin og fleiri onnur vi› honum, meir enn einafer› hava stungi› høvdi› inn í lítla rúmi›, har vit sita, vi› spurningum til vertirnar um eitt og anna›, hildu vit, at vit nú høvdu veri› til nóg miklan ampa og takka›u fyri okkum vi› gó›um ynskjum.